## Er avgerðin um at skerja rættindi hjá limum eldri enn 70 ár etiskt forsvarlig?

Øll fólk, óansæð aldur, eiga at verða virðiliga viðfarin. Mismunur vegna aldur brýtur við meginregluna um líkavirði og javnstøðu, sum eru týðandi virðir undir bæði generellu samfelagsetikkini og undir sjúkrarøktaretikkini. Tí vil SER altíð taka frástøðu frá aldursmismuni. Av hesum fylgir, at um grundgevingin fyri, at eftirlønt missa valrætt og -bæri er grundað á, at eftirlønt hava ein ávísan aldur, meta vit **ikki**, at avgerðin er etiskt forsvarlig.

Grundgevingin sum var givin á aðalfundinum var tó, at av tí at eftirlønt ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, verður ikki mett rímiligt, at tey skulu hava avgerðarrætt til mál, sum hava við arbeiðsmarknaðin at gera. Um vit taka somu prinsippir sum í fyrra døminum, nevniliga líkavirði og javnstøðu, so ber til at tulka hesi virðir út frá regluni hjá Aristoteles um, at "javnlík mál skulu viðfarast javnlíkt og ójøvn mál skulu viðfarast ójavnt, samsvarandi viðkomandi munum". Spurningurin verður tí, um tað at verða á ella av arbeiðsmarknaðinum er ein viðkomandi munur, tá atkvøðast skal um arbeiðsmarknaðar mál. Tað vildu tey flestu nokk tikið undir við, er ein viðkomandi munur. **Av tí sama tykist avgerðin at verða bæði røtt og rímilig**.

Tó so, arbeiðismarknaðar mál kunnu raka áhugamál og rættindi hjá eftirløntum, og tá er støðan ein onnur. Tá vildi tað verið diskriminerandi fyri eftirlønarbólkin, at tey ikki hava atgongd til at atkvøða á jøvnum føti við virknar limir, og av tí sama órættvíst og soleiðis **ikki etiskt forsvarligt.**

Tá tað er sagt, kann man argumentera fyri, at eftirlønt framvegis eru partar av samfelagnum og at teirra royndir og sjónarhorn kunnu verða virðismikil í avgerðarprosessum, sum ávirka arbeiðsmarknaðin. Tí er ikki vist, at tað er ein so klók avgerð, at útihýsa tey eftirløntu, Men etiskt halda vit, at avgerðin **kann** forsvarast, soleiðis sum vit hava grundgivið fyri omanfyri, út frá teim fortreytum fyri grundgevingini, sum vit hava sett fyri viðgerðini.

Tíverri eru grundgevingarnar ikki til taks á skrift, og júst umstøðurnar fyri valið, fer SER at viðgera út frá einum samfelagsetiskum sjónarhorni ein av komandi døgunum.